FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

# Reglugerð fyri Ráð teirra lesandi á Fróðskaparsetri Føroya

Ráð teirra lesandi (stytt RTL) er umboðandi eind teirra lesandi á Setrinum. Ráðið er mannað við umboðum av øllum deildum Setursins og hevur til endamáls at umboða áhugamál teirra lesandi á Setrinum í sambandi við lestur og lestrarumhvørvi.

**§ 1 Aðalfundurin**

Aðalfundurin er hægsti myndugleiki hjá Ráði teirra lesandi , og kann viðgera øll viðurskifti, ið viðkoma virkisøkinum og endamálinum hjá ráðnum.

*Stk. 2.* Formaður ráðsins kallar inn til aðalfund, ið skal vera eftir lestrarársbyrjan og í seinasta lagi 30. september. Minst 3 vikur frammanundan skal innkalling sendast við telduposti til øll lesandi.

*Stk. 3.* Á hvørjum aðalfundi skulu niðanfyri nevndu punkt vera á skrá:

- Val av orðstýrara og skrivara
- Ársfrágreiðing formansins
- Fíggjarstøða
- Nevndarval
- Innkomin uppskot
- Ymiskt

*Stk. 4.* Uppskot til aðalfundin skulu sendast til RTL seinast tvær vikur undan fundinum. Tilskilast skal, hvussu uppskot vera send ráðnum í fundarinnkallingini.

*Stk. 5.* Formaðurin skal skriva eina ársfrágreiðing , ið skal lýsa virksemi ráðsins farna árið og møguligar framtíðarætlanir. Umframt at leggja frágreiðingina fram á aðalfundinum, skal Lestrarskrivstovan hava eitt eintak at leggja á heimasíðuna.

*Stk. 6.* Atkvøðurætt á aðalfundinum hava øll, ið eru lestrarvirkin í mánaðinum aðalfundurin verður hildin.

*Stk. 7.* Eykaaðalfundur kann verða hildin, um meiriluti av RTL atkvøðir fyri hesum. Lesandi kunnu heita á RTL um at halda eykaaðalfund. Eykaaðalfundurin hevur somu heimildir sum aðalfundurin.

*Stk. 8.* Innkalling til eykaaðalfund skal sendast í seinasta lagi tvær vikur undan fundinum. Innkomin uppskot skulu sendast til RTL eina viku undan fundinum.. Á skrá til eykaaðalfundin skulu vera hesi punkt:

- Val av orðstýrara og skrivara
- Innkomin uppskot
- Ymiskt

## § 2 Skipan av Ráðnum

Skipanarfundur í RTL skal vera í seinasta lagi eina viku eftir aðalfundin. Tað er sitandi formaður, sum kallar inn til fund og stjórnar honum.

*Stk. 2.* Á skipanarfundi gevur fráfarandi formaður nývalda ráðnum frágreiðing um virksemi og skyldur ráðsins. Síðani verður ein av nýggju ráðslimunum valdur sum nýggjur formaður. Hann tekur yvir stjórnani av fundinum, og fráfarandi formaður fer formliga úr sessinum.

*Stk. 3.* Ráðið skal skipað seg við formanni/-kvinnu, skrivara og kassameistara. Ráðið velur sjálvt, um tey seta aðrar postar, so sum varaforfólk.

*Stk. 4.* Tá ráðið er skipað, skal nýggi formaðurin boða Lestrarskrivstovuni frá, hvussu ráðið er skipað, og hesi skulu í felag tryggja, at tað verður lýst á heimasíðu Setursins. Fráboðan um nýggja ráðið skal eisini lýsast á sosialu miðlum ráðsins.

*Stk. 5.* Fundarætlan skal leggjast fyri árið.

*Stk. 6.* Á fyrsta fundi eftir skipanarfundin skal nýggja ráðið leggja eina arbeiðsætlan fyri ráðsvirksemi í lestrarárinum. Hetta eigur yvirskipað at umfata regluligt samskifti við Setursleiðsluna umvegis samstarvsfundir, umframt hvørji tiltøk og átøk RTL í høvuðsheitum ætlar at skipa fyri og eisini eina fíggjarætlan fyri lestrarárið.

## § 3 Mannagongd fyri fundarvirksemið

Eina viku áðrenn fund skal formaðurin senda út fundarskrá. Ráðslimir hava rætt til at seta mál á skrá og skulu hesi mál takast við, um mett verður, at tey eru viðkomandi fyri virkisøkið og endamálið hjá ráðnum.

*Stk. 2.* Føst mál á fundarskránni skulu vera:

- Góðkenning av fundarskrá
- Góðkenning av fundarfrágreiðing frá seinasta fundi
- Fíggjarstøða
- Høvuðsevni á skrá, ásett áðrenn fundin
- Ymiskt

*Stk. 3.* Er brátørvur á fundi, skal formaðurin kalla inn seinast 2 samfullar dagar frammanundan.

*Stk. 4.* Tríggjar yrkadagar eftir fund skal skrivarin hava fundarfrágreiðingina lidna, sum ráðslimir skulu kunna gera viðmerkingar til. Fundarfrágreiðingar skulu goymast á felags KT-palli, har allir limir hava atgongd. Stytt útgáva av fundarfrágreiðingum skal leggjast á heimasíðuna. Stytta útgávan skal sendast til Lestrarskrivstovuna, ið leggur hana á heimasíðuna.

*Stk. 5.* Øll verandi lesandi hava rætt til at biðja um innlit í upprunaligu fundarfrágreiðingarnar. Allar persónligar, viðkvæmar upplýsingar ella trúnaðarupplýsingar eiga at takast úr fundarfrágreiðingini, áðrenn tann lesandi fær slíkt innlit.

*Stk. 6.* Ráðslimur hevur rætt til at biðja um at fáa fund settan um neyðugt.

*Stk. 7.* Er mál, sum krevur atkvøðugreiðslu, skal atkvøðast. Atkvøðugreiðslan kann gerast loynilig í almennum skjølum, um ráðslimur setur fram ynski um tað og ráðið semist um hetta. Stendur á jøvnum, er formansins atkvøða galdandi. Hevur atkvøðugreiðsla verið, skal hetta viðmerkjast í fundarfrágreiðingini, umframt úrslitið av henni.

*Stk. 8.* Bert ráðslimir hava atkvøðurætt á fundi. Nærri reglur fyri umboð teirra lesandi í stýrinum eru tilskilaðar í *Viðtøkur fyri Ráð teirra lesandi á Fróðskaparsetri Føroya §1. Stk. 3.* Er umboð teirra lesandi í stýrinum valt sum limur í RTL, varðveitir hesin tó sína støðu sum ráðslimur.

*Stk. 9.* RTL kann bjóða øðrum við á fund, um mett verður, at viðkomandi kann lýsa mál á ein hátt, sum RTL ikki kann. Viðkomandi hevur tó ikki atkvøðurætt.

## § 4 Val av RTL

Umboð verða vald í RTL fyri 1 ráðsár. Ráðsár er at skilja sum tíðin millum tveir aðalfundir (her ikki talan um møguligar eykaaðalfundir). Tó verður formaðurin sitandi til skipanarfundin í komandi ráðsári.

*Stk. 2.* Valið fer fram á aðalfundi hjá RTL. Mannagongd fyri, hvussu valið er skipað, stendur í "*Mannagongd fyri vali av umboðum í Ráð teirra lesandi*" (Stytt MFV).

*Stk. 3.* Tvey umboð skulu finnast fyri hvørja deild. Um ikki tvey fólk eru uppstillað fyri ávísa deild kann annar av sessunum falla til aðra deild, nærri tilskilað í MFV.

*Stk. 4.* Um deild ikki er umboðað eftir aðalfundin hjá RTL, skal ráðið royna at finna umboð fyri hesa deild.

*Stk. 5.* Um umboð verður funnið fyri eina deild, ið manglar umboð, eftir at valið hevur verið, skal RTL lýsa við hesum um Lestrarskrivstovuna. Lestrarskrivstovan sendur teldupost til øll lesandi, har tey fáa 1 viku at boða frá, um tey ynskja at mótmæla, at viðkomandi fær sessin. Mótmælt verður við at senda beinleiðis boð til RTL. Mótmæli verða viðgjørd av RTL, ið tekur endaliga avgerð um, hvørt mótmælið talar fyri, at viðkomandi ikki skal fáa sessin. Kemur einki mótmæli innan ásettu freistina, so skal RTL geva viðkomandi sessin uttan víðari viðgerð. Verður nýtt umboð sett í sess, so skal hetta lýsast.

*Stk. 6.* Um umboð velur at siga sessin frá sær í ráðsárinum, verður varaumboð set ístaðin, um gjørligt. Umboð boða formanninum frá, um tey ynskja at siga sessin frá sær. Umboðið eigur tó ikki at siga sessin frá sær eftir 1. juni.

*Stk. 7.* Ein og hvør valførur persónur kann kæra um hildið val. Kæran skal, innan fimm yrkadagar eftir at úrslitið er kunngjørt, verða latin RTL skrivliga. RTL tekur saman við Lestrarskrivstovuni støðu til kæruna innan 1 viku. Avgerð teirra er endalig.

## § 5 Ráðsarbeiði

RTL skal umboða áhugamálini hjá teimum lesandi. Harumframt arbeiðir ráðið við lestrarpolitikki, -umhvørvi og -trivnaði, umframt at skipa fyri viðkomandi tiltøkum og átøkum.

*Stk. 2.* Lesandi kann leggja mál fyri ráðið við at senda ráðnum ein teldupost.

*Stk. 3.* RTL skal viðgera mál, ið lesandi leggja fram fyri ráðið – uttan mett verðu,r at tey eru uttanfyri virkisøkið og endamálið hjá RTL.

*Stk. 4.* Mál, ið lesandi leggur fram, skal á skrá á næsta fundi sambært fundarætlanini.

*Stk. 5.* Øll tiltøk, sum RTL skipar fyri, skulu vera fyri øll lesandi á Setrinum.

*Stk. 6.* Um Setrið ynskir umboð fyri lesandi í nevnd/bólk, so hevur RTL skyldu at finna ein lim. Hetta er treytað av, at arbeiði er viðkomandi fyri lesandi.

**§ 6 Bygnaður og samstarv**

Er ivi millum ásetingar í ymisku bygnaðarskjølunum, so verður hendan raðfestingin nýtt:

1. Viðtøkur fyri Ráð teirra lesandi á Setrinum.
2. Reglugerð fyri Ráð teirra lesandi á Setrinum.
3. Mannagongd fyri vali av Ráði teirra lesandi á Setrinum.

*Stk. 2.* RTL kann samstarva við aðrar felagsskapir, ið arbeiða fyri somu áhugamálum sum RTL.

Mars 2021
Fróðskaparsetur Føroya

Sonni Johnsson

**Sonni Oddbjørn Johnson**
Formaður fyri Ráð teirra lesandi

**Chik Collins**
Rektari á Fróðskaparsetri Føroya